**SPREINGIPULVUR**
Til klúgving av steinum



Vælegnað til tún, kjallarir o.a., har tað ikki ber til at spreingja

Fæst í 2 kg og 10 kg spannum

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umboð - Tel. 315600 - Fax 318008



**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Nú eisini úr Føroyskum gróti

Sosialurin - 311820



Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN



**máling & gólv**

NAIRN VINYLGÓLV
CLASSIC
* Slitsterkt vinyl
* Stórt úrval
* TILBOÐ:
Ókeypis álagt
4 m breitt:
380kr.
meturin

**máling & gólv**
við Landavegin
Tlf. 316066


# Kundamóttakari

## til P/F Wenzel bilverkstað

P/F Wenzel hevur eitt vælvirkandi bilverkstað, sum hevur nakrar dugnaligar bilsmiðir og lærlingar, sum dagliga loysa tær uppgávur, ið viðskiftafólk okkara bjóða okkum.

Tínar uppgávur
- Avgreiða kundar okkara
- Útfakturering
- Planlegging av arbeiði
- Leiða og skipa dagligu arbeiðsgongdina saman við verkastjóranum.

Vit hugsa okkum at
- tú hevur viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- tú hevur telduroyndir á brúkarastøði
- tú ert opin og fyrikomandi
- tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur hug at læra nýggjar arbeiðshættir

Tú ført eitt
Sera spennandi arbeiði í eini fyritøku, sum setur útbúgving, góðsku, persónliga útvikling og effektivitet sera høgt.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú spurningar
Tosa við Anthonius Dalsgaard, verkastjóra.

Send umsókn tína til

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5
100 Tórshavn
Att.: Anthonius Dalsgaard
merk brævbjálvan »Kundamóttakarin«

# Vikarur

**til Hvalbiar Skúla**

Søkt verður eftir vikari til Hvalbiar skúla skúlaárið 2002/2003. Starvið er fyri lærara í farloyvi, og er eitt fulltíðarstarv.

Starvið verður lønt sambart avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu verða Hvalbiar skúlastýri í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

Umsóknir skulu stílast til:

**Hvalbiar Skúlastýrið**
Att.: Róin Schrøter, formaður
850 Hvalba

TK Stovan

## KUNNINGARFUNDUR UM EINKARRÆTT

**Hvussu verjir tú eina vøru ella eitt hugskot við patent, vørumerki, brúksmodell, design (íroknað Software).**

**Mikud. 22. mai kl. 14.00-16.30 á Tekn. Skúla í Klaksvík**

**Hósd. 23. mai kl. 14.00-16.30 á Hotel Føroyum í Havn**

Patent- og Varemærkestyrelsen skipar saman við TK Stovuni fyri almennum kunningarfundi.

Endamálið við fundunum er at kunna virkjum og einstaklingum um møguleikarnar fyri at verja rættin til nýggjar framleiðslur (vørur og hugskot), t.d.:
- Hvat kanst tú fáa einkarætt til?
- Hvat hendir, frá tí, at ein umsókn er latin inn til Patent- og Varemærkstyrelsen?
- Hvør skrivar umsóknina fyri meg, ella kann eg gera hetta sjálvur?
- Hvussu slepst undan at misnýta rættin hjá øðrum til eina vøru ella hugskot?
- Hvar finni eg ókeypis hjálp á Internetinum um evnið einkarætt?
- Hvussu kann Patent- og Varemærkestyrelsen ella TK Stovan hjálpa tær?
- Um eg havi fingið rættin, hvussu verji eg rættin móti misnýtslu?
- Hvat kostar tað?

Fundurin er fyri vinnurekandi og einstaklingar, sum hava áhuga fyri evninum.
Ábyrgdarøkið hjá Patent og Varestyrelsen er Føroyar, Grønland og Danmark.
Henrik Hugger, kunningarstjóri hjá Patent og Varemærkestyrelsen, hevur fyrr verið í Føroyum í samband við kunningarfund um einkarrætt. Hann fer saman við TK Stovuni at greiða frá, hvussu farið verður fram, tá ein skal taka patent, og hvørja hjálp ein kann fáa í hesum sambandi.
Á fundinum viðgera vit ofta settar spurningar. Evnið er viðkomandi fyri bæði størri og smærri virkir og fyri einstaklingar, sum hava áhuga fyri evninum.
Hóast fólk ella virkir fáa eitt gott hugskot, merkir tað ikki altíð, at ein skal taka patent. Greitt verður frá ymiskum øðrum møguleikum. Somuleiðis verður nomið við evnið SW, og heimasíður.
Somuleiðis verður greitt frá, hvussu ein tryggjar sær rættin til eitt vørumerki, eitt brúksmodell og eitt design (klæðir, skinnvørur, SW, heimasíður v.m.). Hvat er munurin millum patent og brúksmodell, og nær er tað av týdningi at verja eitt design?

**Tilmelding:** TK Stovan, fax 31 93 63, tlf. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo
Tilmelding í seinasta lagi **týsdagin 21. mai 2002**
Tiltakið er ókeypis, men kaffisteðgurin ger, at neyðugt er at melda seg til frammanundan.

Virkisnavn: ____________ Tal av luttakarum: ____________

Navn/nøvn: ____________

Tel.: ____________ Fax: ____________

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**

TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir tveimum starvsfólkum til Frítíðarskúlan í Kollafirði.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv 25 tímar um vikuna og eitt hjálparfólkastarv 25 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Í Frítíðarskúlanum í Kollafirði, sum heldur til í Skótahúsinum ganga 25 børn. Karmarnir eru góðir. Økið rundan um er barnavinarligt og stutt er í fjøru og haga.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran og ítróttur hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum. At tú ert førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúla, og at tú tímir at vera saman við børnunum bæði úti og inni.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 6. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri

**Meiri fæst at vita**
um størvini hjá Maluni Jógvansdóttir, leiðara, tlf.42 13 23 ella Katrini Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Frítíðarskúlanum í Kollafirði í hendi í seinasta lagi 1. juni 2002.

SNARSKIVAN

Útbjóðing

# Rakstur av sølubúðum

Við hesum verður raksturin av sølubúðunum á Farstøðini í Klaksvík, og umborð á Dúgvuni og seinni eisini Ternuni, boðin út.
Leigumálið verður galdandi frá 1. juni 2002 fyri Farstøðina og Dúgvuna.

**Uppgávurnar**
Høvuðsuppgávan er at hava sølubúðirnar opnar allar túrar, ið skipið siglir eftir galdandi ferðaætlan og at halda vøruúrvalið og tænastuna annars á nøktandi støði.

**Tænastukrøv**
Leigarin bindur seg til sambært avtalu at reka sølubúðina á ein dygdargóðan hátt og hevur ábyrgd av, at sølu- og matvørulógir verða hildnar.

Leigarin bindur seg eisini til at gera reint í rúmum og øllum hølum, har ferðafólk hava atgongd, og at matskaffa til manningina umborð.

Harumframt skal tað fólkið, ið eina og hvørja tíð starvast í sølubúðini:
- hava góðan málkunnleika
- verða fyrikomandi
- hava góðan tænastuhugburð

**Manningarkrøv**
Tað fólkið, ið til eina og hvørja tíð starvast í sølubúðini umborð, hevur sítt pláss í sløkki- og bjargingarskipanini og skulu tí lúka øll tey minstukrøv, ið krevjast til at mynstra umborð á føroyskum ferðamannaskipið.

Hesi mynstukrøv eru:
- Siglingarbók
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Sløkkiskeið

**Umsóknir**
Umsóknarbløð fáast við at venda sær til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 27. mai 2002, kl. 12:00

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutnings-leiðara á tlf. 343000 ella e-mail: pjt@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutnings-anleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*





-tað loysir seg!


Ferðaætlan

# Hvítusunnudag

**verður siglt eftir hesi ferðaætlan**

**Leið 30: Vestmanna-Oyragjógv-Vestmanna**
Av Vestmanna: kl. 09.35 og 10.25 og 17.15
Av Oyrargjógv: kl. 09.55 og 10.45 og 17.40

**Leið 50: Klaksvík-Leirvík-Klaksvík**
Av Klaksvík: kl. 07.15 og 20.45
Av Leirvík: kl. 08.00 og 21.30

**leið 60: Skopun-Gamlarætt-Skopun**
Úr Skopun: kl. 10.30 og 20.15
Av Gomlurætt: kl. 11.15 og 21.00

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini á tlf. 34 30 30.

Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS


Vask Vask Vask

**Vaskarí & Reinger hevur brúk fyri fólki, i dáma at hava vi reinger at gera**

**Vit hava brúk fyri fryntligum og tilkomnum fólki til høvu sreinger og til fastar vaktir eftir vanliga arbei stí , umframt ver ur søkt eftir avloysarum til summari 2002, í Tórshavn.**

**Ljó ar hetta áhugavert fyri teg/tykkum, og vilt tú ver a ein partur av einum dynamiskum team'i , vinarliga seti tykkum í samband vi tlf. 283934, og fái meiri at vita.**

Vaskarí & Reingering

*Tænasta síðani 1983*